# Enn ein linja til G!



*Eilif Debes og starvsfelagi hansara Bárður hava skipað so fyri, at enn ein telefonlinja til G-skrivstovuna gjørdist veruleiki*

*Mynd: Bárður*

**Einki G! uttan gott samskifti við umheimin. Tað syrgdu teir hjá Føroya Tele fyri**

TELETÆNASTA

**Syðrugøta:** Í langa tíð hava tær tónlistarligu og tøkniligu fyrireikingarnar til G!-festivalin staðið ovarlaga á breddanum hjá einum hópi av fólkum.

Hetta arbeiðið hevur í høvuðsheitum verið í samband við sjálvt tiltakið. Men á øðrum økjum – rundan um tiltakið – er eisini neyðugt við fyrireikingum, um eitt tað skal eydnast til fulnar.

Ein partur av hesum arbeiðinum er at syrgja fyri, at eitt so fundamentalt ting sum telefonsambandið er í lagi. Og tað var hetta arbeiðið sum menn hjá Føroya Tele vóru í ferð við tíðliga í summar.

Ein góðan dag seinast í mai mánaði, tá vit komu koyrandi framvið Syðrugøtu, vóru teir í ferð við at syrgja fyri at hesin samskiftisparturin av tí stóra festivalinum var í lagi.

Teir báðir, Eilif Debes av Oyri og starvsfelagi hansara Bárður úr Havn, vóru henda dagin í telefonhúsinum í Syðrugøtu í hesum ørindum. Út frá arbeiði teirra kundu teir stutt eftir staðfesta, at linjan til bygdina var í lagi, tí tóni var í. Síðani var bert eftir at fara til kundan at vita, um tónin eisini var har.

Hetta var ikki júst tann seinasti, men ein av teim seinastu arbeiðsdøgunum hjá Eilifi. Fyrr í summar gavst hann nevniliga hjá Føroya Tele, eftir at hava starvast har í samfull 33 ár.

– Hetta hava verið 33 góð ár, leggur hann dent á.

## 70 ár

Í sambandi við 70 ára føðingardag mín, ið var 2. juli, verður morgundrekka á Jørundsgøtu 17, Klaksvík, leygardagin 23. juli frá kl. 10.00 til 14.00.

**Vinarliga Karin Poulsen, tlf. 455842**

## 85 ár

Í dag, 23. juli verður Kathrina á Fløtunum, Lamba 85 ár, dagurin verður hildin í Kvinnufelagshúsinum frá kl. 15.00-19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 80 ára føðingardagur

Sunnudagin 24. juli fyllur Poul Kjartan Bærentsen 80 ár. Føðingardagurin verður hildin í Lonini í Fuglafirði, har øll eru hjartaliga vælkomin millum kl. 14.00 og 17.00.

## 90 ára føðingardagur

Sunnudagin 24. juli fyllur Mathilda Weihe av Selatrað 90 ár. Vegna forfall, er føðingardagshaldið hjá Mathildu Weihe, sunnudagin 24. juli avlýst.

## Prógv

Tann 8. juli hevur Silvia Weihe Dalsgaard lokið prógv sum bachelor Biomedical Sciences University of Westminster London.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Anfinn Olivur Miðhamar** úr Skúvoy, andaðist í heiminum týsdagin 19. juli, 65 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum í dag, leygardagin klokkan 13.

Tey ið vilja minnast Anfinn, kunnu lata eina gávu til dóttrina á konto í Føroya Banka.

**Magdalena Samuelsen, vanliga nevnd Ninna,** ættað úr Vestmanna, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Láargarði mikudagin 20. juli, 89 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju sunnudagin klokkan 15.00

Tey, ið vilja minnast Ninnu, kunna lata Láargarði eina gávu, konto í Føroya Sparikassa.

**Alfrida Hammer,** Runavík, andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi mikudagin, 93 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík í dag, leygardagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju sunnudagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

**Marianna Mikkelsen,** ættað úr Svínoy, búsitandi í Havn, andaðist á Tjarnargarði 20. juli, 98 ára gomul. Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum sunnudagin klokkan 13.

*Kelda: Kringvarp Føroya*

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og góða hjálp, tá elskaði maður, pápi, abbi og langabbi okkara

**Esbern Michael Magnussen**

doyði og varð jarðaður.

**Dany**
**Daniella, Kári og Esbern v/ familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæra mamma, vermamma, omma, langomma og systir

**Arna Clementsen**
Sandur

andaðist og fór til gravar.

Stóra takk fyri alla hjálp og troystarrík orð.
Eingin nevndur, eingin gloymdur.

*Familjunnar vegna*
**Sólbjørg, Herálvur og Súsanna**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góði pápi mín

**Anfinn Hans Oliver Miðhamar**

ættaður úr Skúvoy

andaðist í heiminum týsdagin 19. juli, 65 ára gamal.

Bønarhald verður í kirkjugarðskapellinum í Havn fríggjadagin kl. 13.00.
Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum leygardagin 23. juli kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Johanna Katrina**

Tey, ið ynskja at minnast Anfinn, kunnu lata eina gávu til dóttrina á konto í Føroya Banka.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Magdalena Frederikke Samuelsen**

vanliga nevnd Ninna

ættað úr Vestmanna, búsitandi í Havn

andaðist á Lágargarði mikudagin 20. juli
89 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju sunnudagin 24. juli kl. 15.00.

*Familjunnar vegna*
**Andreas og Jóannes**

*Tey, ið vilja minnast Ninnu, kunnu lata eina gávu til Lágargarð, konto í Sparikassanum.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Ajlif Hansen**
Fuglafjørður

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur.
Tøkk til Una Næs, prest, kirkjutænarar og sangara og tey, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til B6 og til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Hjartans tøkk øll somul.

**Elfrida og børnini**